## VIÐMERKINGAR

# Fyrireika flokkin til avbjóðingar

**Landsfelag Sjálvstýrisfloksins**
*Lasse Klein, formaður*

Sjálvstýrisflokkurin heldur fram í góðum treyti, og ferð at miðja fram ímóti, at økja um undirtøkuna millum veljarar á øllum økjum.

Sjálvstýrisflokkurin hevur eins og aðrir politiskir flokkar tørv á at viðgera støðu sína, bæði tá talan er um almenna politiska arbeiði, og ikki minst tá talan er um umsingarliga arbeiði í flokkinum.

Fyri 14 døgum síðani skipaði Landsfelag Sjálvstýrisfloksins fyri fundi í Klaksvík, saman við Norðoya Sjálvstýrisfelag og nú stendur Eysturoyggin fyri tørni.

**Frá fundinum í Klaksvík**

Hóskvøldið skipaði Landsfelag Sjálvstýrisheild, ella við øðrum orðum – at fyrireika floksskipana til komandi avbjóðingar.

**Veljarakanningarnar**

Hetta fundarvirksemið hevur einki við seinastu veljarakanning at gera, men vit mugu ásanna, at vit við hesi veljarakanning hava sæð skriftina á vegginum, og eiga tí í enn størri mun leggja dent á menningararbeiði í flokkinum.

**Limatalið økist**

Limatalið hjá Sjálvstýrisflokkinum er í dag uppá 500 limir í alt, og síðani flokkurin fekk nýggja heimasíðu er limatalið økt.

Í dag hevur Sjálvstýrisflokkurin eina virkna Landsnevnd, og eina virkna Starvsnevnd, sum á komandi landsfundi floksins, sum verður í januar 2004, fara at leggja fram fjølbroytt tilfar til umroðu og støðutakan.

**Halda fram**

Sjálvstýrisflokkurin heldur fram í góðum treysti, og ferð at miðja fram ímóti, at økja um undirtøkuna millum veljarar á øllum økjum.

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00

fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo

# I´m not a crook

**tórbjørn jacobsen**

Millum manna verður hildið, at hetta vóru orðini sum feldu Richard M. Nixon. Watergate-málið var komið í hæddina og amerikanski forsetin gjørdi eina seinastu roynd at vinna fólksins og tjóðarinnar álit aftur. Og ongum at siga, so gjørdist júst hendan málberingin, á politisku eggini, I´m not a crook — Eg eri ikki óreiðiligur, endaligi katalysatorurin til eitt politiskt sjálvmorð, sum ikki eigur sín líka í amerikanskari sogu.

Hetta hendi fyri tríati árum síðani, og eftir tað hava tey flestu, sum koma sær alment fram, roynt at skáka sær undan hesi orðingini ella málbering sum líkist hesum.

Hetta forðar tó ikki Bjarna Petersen, skipara í Kollafirði, at gera somu royndina. Í einum lesarabrævi í Sosialinum fríggjadagin útbasunerar hann so bombastiskt: "Arctic Viking er ikki veiðitjóvur" tvs. "Eg eri ikki veiðistjóvur."

Nú er tað ikki politikkur, men rækjufløkjan, sum Ingolf á Marknagarði so beinrakið nevnir kvotamálið í Eysturgrønlandi,ið tað snýr seg um. Og í mun til Nixon so skal eg hervið staðfesta, at eg onga sum helst orsøk havi til at halda, tíansheldur at skuldseta, Bjarna og hansara menn fyri at vera veiðitjóvar. Tað segði eg honum eisini í telefonini seinasta fríggjadag. Tað er rætt at eg lovaði honum eina almenna rættleiðing, men somuleiðis visti hann eisini frá samrøduni, at undirritaði var sperdur av arbeiði og skuldi av landinum sama dagin. Tí kemur hetta skrivið ikki fyrrenn nú.

Kollfirðingarnir og vit avráddu keypið um tær báðar Kjølbro kvoturnar um somu tíð. Somuleiðis var tað við kvotuni hjá Kappanum, sum vit keyptu hvør sína helvt av. Í samband við at vit ætlaðu okkum til Eysturgrønlands um mánaðarskifti november-desember, ringdi eg til reiðaran á Kappanum, Sofus Poulsen, og spurdi hann um alt nú var í lagi við keypinum, soleiðis sum vit høvdu avrátt tað. Tað helt hann ikki, sambært boðum frá Fiskiveiðieftirlitinum. Seinri kom so hitt famøsa brævið frá efirlitinum, sum bæði vit og kollfirðingarnir eisini fingu eitt avrit av í postinum, harið stendir skrivað: "Vísandi til avtalu millum P/F O.C.Trol og M.tr Napoléon v/ Kongshavnar Útgerðarfelag, Glyvrar um sølu av 57,5 tonsum av rækjum burtur av rækjukvotuni í Eysturgrønlandi hjá M.tr Kappanum til M.tr Napoléon, skula vit við hesum siga frá, at vit við heimild í § 15 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 við seinni broytingum, hava góðkent oman fyri nevndu sølu/keyp. Av tí at avtala eisini er gjørd við annað skip um sølu/keyp av somu nøgd av rækjum undir Eysturgrønlandi og við tað at tað ikki er pláss fyri hjá báðum skipum at gagnnýta kvotuna fult út, verður boðað frá, at tað ikki ber til hjá báðum skipum at gagnnýta keypið fult út."

Higartil hevur einki leikfólk tíansheldur nakar løgfrøðingar sett seg føran fyri at greina hendan kryptiska tekstin. Men samanumtikið fáa oyramenninir bara at vita, at tann kvotan (115 tons) sum teir høvdu fingið tillutaða frá almennu umsitingini ikki er til, í hvussu er ikki í fult mát. Harvið má onkur hava etið burturav kvotuni hjá Kappanum, og tað er, sum rímligt er, ein stórur trupulleiki fyri eigararnar, mótvegis triðja parti/þortum sum sølu/keyps-sáttmáli er gjørdur við, í hesum førinum okkum og Líðina í Kollafirði. Eingin hevur enn frá almennari síðu verið frammi og greina hvussu hetta málið hongur saman.

Skuldu Bjarni og aðrir havt fingið tað fatan at undirritaði hevur lagt Arctic Viking undir at hava sleikt burturav hesi kvotuni,ið verður sødd at vera vorðin burtur, tá hevur hetta absolut einki við veruleikan at gera. Einasti blaðmaðurið hevur tosa við meg um hetta málið er Ingolf S. Olsen á Dimmalætting. Greinin stóð á forsiðuni týsdagin 4. november. Í greinini stendur einki um at Arctic Viking hevur fiska meira av kvotuni hjá Kappanum enn tann partin sum teir sjálvir høvdu keypt. Hinvegin stendir tað, at eitt mál er latið fútanum viðvíkjandi Arctic Viking, men tað snýr seg um eitt heilt annað mál, og tað hava fleiri, eisini undirritaði, vita í heilt langa tíð. Sum eg fráboðaði Bjarna í telefonini, so hevur Ingolf yvir fyri undirritaða váttað, at viðmerkingarnar hansara eru ongantíð sagdar um hetta mál.

Tá ið avtala verður gjørd, líkamikið um hon er munnlig ella skrivlig, imillum teir og Líðina, so er tað vælsaktans eitt greitt tekin um at Kjølbro ongar ætlanir hevði í so máta. Tá er tað ið so skilaleyst, at umsitingin ætlar, at Føroyar skula brenna inni við hesum 115 tonsunum um ársskiftið. Sum enntá eru fingnar til høldar í býtishandli við tilfeingi á føroyska landgrunninum. Politiska skipanin hevur ígjøgnum alt hetta árið havt ætlanir um og hevur síðani broytt skipanina um sølu av tillutaðum kvotum í Eysturgrønlandi, sjálvandi av tí sannroynd at skipanin ikki virkaði. Tí fer tað at koma óvart á mangan um landfogeden, ella rættari fútin, yvirhøvur fer at gera meira við hetta málið.

Og tey munna ikki vera so fá í hesum landinum, sum spyrja seg sjálvi, hvussu tað gongst við at halda skil á veiðuni á føroyaøkinum, harið fleiri hundrað túsund tons verða veidd, táið so illani gongst at halda skil á hesum vælsignaðu 1150 tonsunum av rækjum í Eysturgrønlandi, sum skula býtast ímillum nøgur fá skip.

Summa summarum. Undirritaði hevur ongantíð ákært kollfirðingarnar fyri at vera veiðutjóvar. Kenni onkrar av teimum somikið væl, havi sitið á skúlabeinki saman við heraranum, Jóhan Joensen í trý ár, á Føroya Sjómansskúla, so tann tankin er ongantíð komin mær til hugs. Hevur ongantíð streifað handan skallabeinini. Hetta eru skilamenn, sum hava roynt sítt ítarsta fyri at halda einum av súlunum undir innløguni í samfelagnum gangandi bæði í góðum og ringum. Tí hava teir annað uppiborið enn allan tann lortin,ið diversir landkrabbar hava oyst omanyvir teir hesar seinastu vikurnar.

# Opið bræv til sjónvarpsstjóran

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*

Eg vil hervið heita á sjónvarpsstjóran, sum er rímliga nýggjur í starvinum og tí ikki skuldi verði stagneraður í starvinum, um at fáa teksta tíðindini frá Íslandi, sum verða send í SVF.

Eg veit ikki hvør í sjónvarpsleiðsluni hevur haft og hevur, ta fatan, at allir føroyingar skilja íslendskt. Eg vil meta, at kanska eitt prosent av føroyingum skilja so frætt av íslendskum, at tey fáa nakað sum helst burturúr sendingini í "grannum okkara" og kann tað ikki verða nøktandi hjá sjónvarpsleiðsluni.

Ísland er okkara grannatjóð og eru føroyingar sjálvsagt áhugaðir í hvat fyriferst í Íslandi, men við verandi støðu, verður kunnleikin frá SVF lítil og eingin.

Fyri nøkrum árum síðani var tað ein, helst fleiri kvinnur, sum alment komu fram við sama ynski, og so vítt eg minnist, bjóðaðu tær sær til at hjálpa við umsetingini, men har hoyrdist tíverri einki aftur.



## VIÐMERKINGAR

# EG ERI eitt rock orkestur

**Óli Nicodemussen**

»Navnið spillir ongan«, verður stundum sagt, men mangur hevur spilt navnið, og er skúladømið her Judas (svíkjarin), sum spilti heiðursnavnið eftir viðgitna jødiska herføraran Judas Makkabeus.

Eitt føroyskt gospel-rock orkestur nevnir seg I AM, og eg havi ætlað mær at skriva um hetta í áravís, uttan at hava fingið upp í lag at gera tað. Men betur seint enn ongantíð, og nú teir eru vorðnir fløguaktuellir aftur, so rann hetta mær til hugs.

Fyrst vil eg siga, at talan er um evnaríkar ungar menn, sum brúka tey evni sum Skaparin hevur givið teimum, og eg havi ongan trupuleika við at hoyra teirra tónleik í útvarpi ella á fløgu, tó at eg ikki meti tónleikin verða egnaðan til at framføra á kristiligum fundi — mær dámar annars væl fimtu symfoni hjá Ludwig van Beethoven (serliga triðja sats), men eg taki hana ikki við mær á møti — heldur ikki um onkur setur gudiligan tekst til tónleikin.

Tað sum harmar meg við orkestrinum I AM er navnið, og eg vil grundgeva fyri tí niðanfyri.

Talan er sjálvsagt um Navn Guds »Eg Eri« í 2.Mós.3:14, men kunnu menniskju loyva sær at brúka hetta Navn?

Í bibilskari tankagongd er navnið eitt og hitt sama sum persónurin (likamliga hjástaddur ella ikki), tað eru nógv dømi um hetta, og tað kendasta er helst »Tí har sum tvey ella trý eru savnað saman í Navni Mínum, eri Eg mitt ímillum teirra« (Matt.18:20). Onnur dømi eru »Hann skal byggja Navni Mínum hús« (2.Sám.7:13), »HARRIN bønhoyri teg neyðardagin, Navn Jákups Guds bjargi tær!« (Sálm.20:2) og »Tí frá upprisi sólar til niðurgongu hennara skal Navn Mítt verða stórt millum tjóðirnar, og allastaðni skal roykilsi verða brent Navni Mínum, og skulu offurgávur verða bornar tí fram; tí Navn Mítt skal verða stórt millum tjóðirnar — sigur HARRIN Gud herskaranna.« (Mal.1:11). Her stendur navni fyri persónin. Skriftstoð, sum viðgera hetta evnið (navn = persón) eru ov mong til at nevna her, - tað er eitt gjøgnumgangandi tema gjøgnum alla bíbliuna. Ahugaði kunnu lesa t.d. 1.Mós. 32:29. 2.Mós.23:21. 33:19-34:5, Dóm.13:6,17-22, 1.Kong.8:16-20,29,33,35,41-44 .9:3, Es.48:9, Matt.28:19, Joh.1:12. 12:28. 14:13. 17:6,26, Róm.10:13, Fil.2:9-10, Ják.5:14 og Op.2:13. Norska »Illustrert Bibelleksikon« hevur eina áhugaverda grein um »Navn« (harundir Navn, Guds), og ivaleyst eru onnur leksikon nyttulig eisini.

»og tjóðirnar skulu sanna, at EG ERI YHWH [I AM]« (Ez.36:20-23). Sagt í stuttum, so sigur Gud »Eg Eri I AM«, og eitt gospel-rock orkestur sigur »Vit eru I AM«. Hvør man hava rætt? Men kanska hava teir valt - tilvitað - ikki at nýta hasa orðingina. Vónandi. Eitt hugsað interview, fyri ikki at verða misskiltur: »Hvørjir eru tit?« »Vit eru All That Rain.« »Og tit?« »Vit eru, - øh, vit kalla okkum I AM«.

Tað triðja boðorðið (í 10 boðunum) sigur soleiðis: »Tú mást ikki misbrúka Navn HARRANS Guds tíns; tí HARRIN letur ikki tann verða óstraffaðan, sum misbrúkar Navn Hansara.« (2.Mós.20:7). Hetta er meiri álvarsligt enn at bannast, tí tað ber nevniliga til at »kola og steikja« eina heila rúgvu, uttan at nevna Navn Harrans.

Jákup tosar um »hitt góða navn,ið tit eru nevndir við!« (Ják.2:7), men tað er ikki navnið »Gud«, men annahvørt børn/fólk Guds, ella allarhelst navnið »kristin« — vit nevna okkum ikki »Kristus«, men »kristin«, t.v.s. tey ið hoyra Kristusi til — og vit ógvast við, av at suðuramerikanskir katolikkar uppkalla børn síni »Jesus«.

Harrin, Gud okkara sigur í Esaias 42:8: »Eg eri HARRIN (I AM), tað er Navn Mítt; Eg gevi ongum øðrum dýrd Mína«, og vit skulu vera vís í, at Hann gevur heldur ongum øðrum Navn Sítt, og tað er er rættiliga ósmæðið, at taka sær Navn Guds, sum heiti á einum tónleikabólki.

Menniskjað hevur eini einastandandi evni til at leypa úr einari grøv í aðra. Jødarnir høvdu slíka virðing fyri Navni Guds, at teir høvdu útgreinaðar avskrivaðu Gamla Testamenti (tær heiløgu rullurnar). Teir vildu heldur ikki lesa Navn Guds YHWH (Eg Eri), táið teir lósu Orð Guds upp í synagoguni, men lósu í staðin Adonai (Harrin) — hetta var ivaleyst at gera ov nógv av, men vit kristnu eiga ikki at leypa í hina grøvina, og brúka Navn Guds sum eitt og hvørt annað navn, uttan at vísa tí hóskandi virðing. Skuldi tað havt eydnast teimum kristnu »lógloysingunum« (antinomistunum) at sannføra tey trúgvandi í Føroyum um, at tey 10 boðini ikki eru galdandi longur, so kann eg í hvussu er minna á, at fyrsta bønin í »Faðir vár« er »Faðir okkara, Tú, sum ert í Himli! Heilagt verði Navn Títt!« (Matt.6:9).

»Tí fyri tykkara skuld verður Navn Guds spottað millum heidningarnar« (Róm.2:24). Sum er, ber ikki til at ummæla tónleikabólkin I AM, uttan at siga, at ein dámar ella dámar ikki »EG ERI« (Harran, Gud Jehova). Hvat um nú onkur (ikki eg) fyriskriftir um at turka pennin - og enntá baða sær - táið teir skrivaðu Navn Guds, í sambandi við at teir heldur, at tónleikurin hjá I AM er vánaligur, og ein slíkur kemur at siga, at »EG ERI« (I AM) er nakað h__. skrambul — tað hoyrir ein stundum verða sagt um tónleik.

Eg skilji væl, at jødarnir hvukku við og østu seg, táið Jesus segði Seg vera EG ERI (Luk.22:70, Joh.8:58. 18:6 ), men eg havi verri við at skilja, at eingin enn hevur tala at alment, um tað, at eitt rock-orkestur kallar seg I AM — hevur eingin hugsað um tað enn, ella er mann bara fittur_

Kæru tit í I AM, eg vóni, at talan er um »synd av óvart«, men nú vita tit í hvussu er betur, um tit ikki vistu tað frammanundan, so eg vil heita á tykkum um at skifta »Navnið« út við okkurt annað, so tit ikki framhaldandi gera tykkum sekar í at »misbrúka Navn HARRANS Guds tíns; tí HARRIN letur ikki tann verða óstraffaðan, sum misbrúkar Navn Hansara« (2.Mós.20:7)«

# Úti undir væðingini liggur ein berur serkur og lúnast

**Olaf Petersen**

Ein av fremstu oddvitunum í tjóðveldisflokkinum var nú um dagarnar í Íslandi og vitjaði lagsbrøður sínar Vinstri- Greinir har hann helt røða á landsfundi.

Yvurskriftin í heši mergjaðu røðu var " Úti undir væðingini liggur ein berserkur og slotar" henda heldur marghátliga yvirskrift sipar helst til forfedrar okkara, víkinganar sum áðrenn serliga ótespiligar bardagar ótu flugusvamp og gingu "berserk" Flugusvampurin hevur tann eginleika at hann koblar heilan úr, menn gerast vitleysir og stríðast harvið meiri eldhugaðir á vígøllinum, ein ynskiligur eginleiki í vápnaðum stríði, tó púra ónýtuligt í politikki. Annars er røðan sum flest allar greinar hjá Tobba, rakstrarróp, klicheir og so nøkur citatir, Ga-Jol filosofar til okkum vanligu lesarar, og meira ella minni suspektar Machokendar marxistiskar, spansk ella portugisiskt talandi latínamerikanskar guerillia hermenn deyðir í bestu árum í onkrum óneygudum høpisleysum stríði, til æru fyri ta hørðu kjarnina.

Vid øðrum orðum ein heilt vanlig tobba grein/røða, mastodonturin yvir øllum mastodontum, í ørvitis tjóðskaputum retorikki. Hetta er vælbjargaði vinnulívsmaðurin,sum útinnir sítt yndisfrítíðarítriv, man mestsum sær smílini millum reglunar og skellláturin í reglubrotinum, meðan hann jongelerar vid snildisligum vælskrivaðum metaforum,væl vitandi at at hetta er góðgæti fyri ungar ófloygdar tjóðveldispisur í skùlaaldri, sum ikki hava roynt flogið enn, og bíligt undir hald fyri teimum yvir skúlaaldur, sum ikki hava lisið ein mansaldur á donskum universiteti fyri danskt SU, men heldur hava roynt at arbeiða í vinnuni, Føroya Landið til frama.

Og tó, kanska er hansara politiska arbeiði ikki bara eitt meinaleyst hobby.

Fyri ikki so langari tíð sídani skrivar Tobby í einum av sínum greinum "Allar smátjóðir sum hava tikið loysing eftir seinra heimsbardaga hava líka síðani skriðið í skræðuni búskaparliga ". citat slut. Hendan skríðan í skræðuni kemur ikki líka illa við hjá øllum.Nei, oppurtunistanir við peningi á bók fáa tá rættuliga hógvarnar fyri seg. Tá land og fólk ekur á knøðunum og tvingsilssølur yvir privat og virkir er gerandiskostur, tá trokast teir um sjálvtøkuborðið, privathús, jørð, virkir, handilsbygningar, skip og fiskiloyvir, alt á sølulista fyri lítið og og lætt, so hjá hyænunum í mannahamid eru tey sjálvskaptu búskaparligu sveiggini ein kærkomin møguleiki at vinna sær pening, um onkur vinur liggur eftirá, ger minni.

Eftir hvat skilst á røðuni so ætlar hann sær at purra Zombiinar á tingið út(ikki eiti á virðing fyri landsins kosnu). Eydnast hetta ikki ætlar hann at eitt ella annað skal mobiliserast, eg veit ikki um Tobby er greidur um hetta, men í allari vanligari skrift og talu verður orðið mobilisering næstan bara nýtt tá tad snýr seg um hernaðarlig tiltøk, og vónandi ætlar Tobby sær ikki at verda so víðgongdur í sínari útpurring.(Vónandi "dagdroymir" hann bert um eitt vápnað stríð, har hann liggur úti undir lívlát ( eins og hansara latínamerikansku yndis yrkarir) á Tinghúsvøllinum reivaður í eitt blóðdálkað Merki, niðurskotin av ondum donskum imperialistum sum hava víðgyrt seg á Gamla Apoteki, alt meðan eitt kór av Baldursbráðum syngur fyri honum latínamerikanskar stríðssangir vid samba rútmum. Hetta er líka so óskyldigt sum tá vit í góðum veitslulag aftaná eitt glas ella trý vilja sleppa út á villar viddir saman vid Kára P og góðtaka ikki nakað minni enn Marxs, Freud og Rolling Stones sum leikbrøður.

Vónandi verdur balsameringin av Sigurdi Sigfussyni ein succes, so balsameringin eisini kemur at umfata oddvitanar í fløroyska tjóðveldisflokkinum, so hvørt sum teir falla frá, vónandi av nattúrligum orsøkum, so kanska tað verður avdúkað hví tjóð-veldismenn eru so eiðasørir í "sunnari fornuft", konsekvenshugsan, sans fyri veruleika og støðutakan í vanligum triviellum politiskum trupulleikum.

Bert fyri at tríva í eitt dømi úr rúgvuni sum øll kenna væl. Fyri fáum árum síðani tvíhildu tjóð-veldismenn, um at danir skyldadu okkum einar 80 milliardir. Stutt eftir hálsaðu teir um og kendu seg noyddar at kuta 365 milliónir av blokkinum um árið. (soleiðis kundi ein hildið áfram).

Uttan á nakran hátt at sammeta tjóðveldismenn vid sinnisjúka massamordaran og bølmenni Lenin, (Hitler kom honum ikki uppá hálvan skógv), tað var hann sum systematiskt byrjaði hópdrápið á sítt egna fólk,við tvangsflytan, mordum og svøltan.

Tá Lenin bleiv balsameraður bleiv tad avdúkað at onnur helvtin av heilanum var tódnað inn í einki,mest sannlíkt er at hetta var tann helvtin sum hýsti vanligt vit og skil og virðing fyri sínum medmenniskjum. Søgan hevur prógvað at hin helvtin riggaði og tað í ólukkumát. Saman við sínum eftirmanni Stalin gjørdi hann av við einar 50 til 60 milliónir av sínum landsmonnum.

Aftaná næsta val verður tad ikki ein berserkur sum lúrir úti undir væðingini, Nei, tað verdur ein berur serkur sum lúnast úti undir væðingini,ein serkuruttan nakað innihald settur uttan fyri alla ávirkan í nógv ár framyvir, spakuliga etin upp av mølið, hetta gevur vónandi so frægt av arbeiðsfriði aftur, at farast kann undir at loysa teir veruligu trupulleikanar sum liggja fyri framman.